Kommunuvalið 9. november

Nú nærkast kommunuvalið í hvørjum, og graml hevur eisini verið um onkrar nýggjar valevnislistar. Nógv umtalaði kvinnulistin var ein, og einaferð varð eisini prátað um ein Havnarlista. Stigtakararnir skulu tó bera skjótt at, um teir ætla sær við, tí freistin at lata listar inn er sett

KOMMUNUVAL
Eydna Skaale
eydna@sosialurin.fo

Tosað hevur verið um tveir nýggjar listar til komandi kommunuval. Kvinnulistan og ein sonevndan Havnarlista.

Einki hevur tó verið at hoyrt aftur um hesar listarnar. Men nú byrjar tíðarfreistin at stramma samanum, og skulu nýggju listarnir við, hava teir júst ein mánaða at leggja seinastu hond á arbeiðið.

Lógin sigur greitt, at valevnislistarnir skulu vera valnevndarformanninum í hendi fýra vikur áðrenn valdagin, og í ár er freistin at lata listarnar inn, sett at vera 9. oktober, kl 18.

Fyri at verða galdandi, skal listin hava ímillum 15-25 stillarar.

Lógin um kommunuval ásetur eisini, at valið skal fara fram annan týsdag í november, sum í ár fellur á 9. november. Tá verða kommunuval sostatt hildin um alt landið.

Ein skylda

Jens Marius Poulsen, á býráðnum í Havn, greiðir frá, at tey, ið verða stillað, hava ikki loyvi at nokta.

– Um eg velji at stilla teg, so hevur tú ikki loyvi at siga nei. Kommunuvalini fungera ikki á sama hátt, sum løgtingsvalini, har tú stillar upp. Hetta er ein skylda, ið áliggur øllum borgarum, sigur Jens Marius.

Víðari sigur hann, at tað er tí, at teir velja ikki at kalla tað býráðspolitikarar, men heldur borgarlig umboð. Tað er ein skylda, at gerast eitt borgarligt umboð, um tú verður valdur til tess. Vilt tú ikki, skal skrivlig umsókn sendast til valnevndina, har frágreiðing skal gevast. Tað kann vera sjúka ella okkurt tílíkt.

Men av og á standast trupulleikar av hesi skipanini.

– Í summum bygdum kann hetta elva til trupulleikar, tá fólk hava til fragd at stilla mammu og døttur á hvør sín lista, í berari óreinheit. Tá tekur eitt familjustríð seg ofta upp, og familjan fer í tvíningar. Men hetta hendir ikki í Havn, tí her eru viðurskiftini meiri skipað, staðfestir Jens Marius, at enda.

Kvinnulistin rokin

Nógv umtalaði kvinnulistin, sum tóktiskt fáa eina so strálandi byrjan, tykist nú vera dottin niðurfyri. Hóast áhugin var stórur, tá byrjað varð at tosa um flokkin, sýnist tað nú, sum tað bert var eitt upplop

KVINNULISTIN
Eydna Skaale
eydna@sosialurin.fo

Hóast framtíðin fyri kvinnulistan sá út til at vera bjørt, sær nú út til, at listin doyði longu í føðingini
Savnsmynd

Røddirnar, sum hart gjørdu vart við, at »Vit vilja gera kvinnur sjónligari í politikki« ella »Kvinnurnar skulu eisini framat«, eru nú, eftir øllum at døma, tagnaðar.

At byrja við, var áhugin fyri kvinnulistanum sera stórur ímillum landsins kvinnur. Fundir vóru hildnir, nevndir vóru settar og gongd kom eisini á arbeiðið við kvinnulistanum.

Men nú er alt arbeiðið steðgað, og at fáa eina viðmerking frá teimum, ið vóru við í arbeiðinum, er sum at leita eftir eini nál í eini sátu. Vónleyst. Eingin sigur seg vita nakað, og eingin ynskir at gera nakra viðmerking.

Eingin eldsál

Súsanna Danielsen váttar tó í stuttari viðmerking, at áhugin fyri listanum tóktiskt ógvuliga stórur. Fundir vóru hildnir m.a. á Vertshúsinum, og í fyrstu syftu var stórur áhugi fyri arbeiðnum. Kvinnurnar tóku avgjørt undir við hugskotinum um ein kvinnulista.

Ein samskipanarbólkur varð tí settur at taka sær av arbeiðnum við at skipa kvinnulistan, og tær byrjaðu eisini arbeiðið.

Seinasti fundurin, tær hildu, var í juli, men tá onkur so tók seg úr arbeiðsbólkinum, datt alt arbeiðið mestsum niðurfyri.

– Tað sum okkum tørvar, er eina eldsál. Tað er eingin slík við í arbeiðinum, sum er. Tá viðkomandi tók seg burturúr arbeiðnum vegna arbeiðið, datt alt niðurfyri. Tað er eingin, sum líkasum fær hinar við sær. Allar sita mestsum bara og bíða eftir hvørji aðrari, og á tann hátt koma vit ongan veg, sigur Súsanna Danielsen.

Súsanna leggur tó afturat, at hon ikki vil avskriva kvinnulistan heilt, bert tí, at hon ikki hevur frætt nakað meiri um arbeiðið við honum.

– Samskipanarbólkurin hevur, sum sagt, ikki havt fund síðani í juli mánaða, og sum eg veit um, er einki annað arbeiði farið fram, við at fáa ein kvinnulista kláran til býráðsvalið. So tað sær út til, at hann er dottin niðurfyri. Men tað er bara tað sum eg veit. Tað kann so væl vera, at okkurt arbeiði er, sum eg bara ikki veit nakað um. So hóast tað sær svart út, vil eg ikki avskriva kvinnulistan heilt, sigur Súsanna Danielsen at enda.

Lær teg nevndararbeiði

TÍÐINDASKRIV
Vinnuhúsið

Fríggjadagin 10. september skipar Føroya Arbeiðsgevarafelag fyrsta skeið í nevndararbeiði.

Evnið var frammi á Vinnudegnum í fjør, og sum íblástur til at viðgera evnið nærri, gav Føroya Arbeiðsgevarafelag út bókling um virkisleiðslu við serligum denti á nevndararbeiði. Nú verður hetta fylgt upp við einum skeiði um evnið

Tað mesta av vinnuligum virksemi verður rikið gjøgnum feløg. Partafelagslóggávan ásetur nøkur formlig krøv um, hvussu leiðslan, og stjórn eiga at leiða eitt felag. Ásetingarnar eru ikki tilvildarligar, men ásettar tí tær eru hentar og hóskandi tá tað kemur til leiðsluna av einum felag.

Í Føroyum er praksis tó ikki tann, sum lógin leggur upp til. Í Føroyum er tað ofta ein eigari av felagnum og í nevndini situr ofta familjan hjá eigaranum. Tað vil siga, at praksis í Føroyum virkar ikki sum lógin leggur upp til. Føroya Arbeiðsgevarafelag metir, at tað hevði verið gagnligt fyri virkisemið hjá feløgunum og harvið hjá øllum samfelagnum, um nevndararbeiðið í føroysku feløgunum í størri mun livir upp til ásetingarnar í løggávuni.

Arbeiðsgevarafelagið hevur sum íblástur til evnið givið út bókling um virkisleiðslu um serligum denti á nevdararbeiðið. Hetta verður nú fylgt upp við einum skeiði um evnið.

Endamálið við skeiðnum er at viðgera grundleggjandi viðurskifti í sambandi við nevndararbeiðið. Viðgjørt verður millum annað:

- Nevndararbeiði generelt, eisini sæð í mun til lógargrundarlagið
- Viðurskiftini millum nevnd og stjórn
- Viðurskiftini millum nevnd og grannskoðarar
- Leikluturin hjá nevndini í at menna felagið

Skeiðið er ætlað verandi og komandi leiðslum (nevndarlimum og stjórum) á meðalstórum virkjum. Skeiðshaldarir eru Jógvan E. Ellefsen, advokatur, Rúni M. Hansen, stjóri, Malan Johansen, samskipari og Klaus Rasmussen, statsaut. grannskoðari

Skeiðið verður fríggjadagin 10. september, klokkan 8:00 - 17:00 á Hotel Føroyum. Pláss er fyri 20 persónum og enn eru 2 pláss eftir. Tit kunnu melda til á www.industry.fo

291 springarar í Klaksvík

Knapt 300 springarar løgdu beinini í Klaksvík beint eftir landsdystin millum Føroyar og Frakland á Tórsvølli
Mynd: Norðlýsið

Mikukvøldið løgdu 291 springarar beinini í Klaksvík. Tað tók langa tíð at drepa teir, men drápið gekk kortini væl

GRIND
Solby A. Eliasen
solby@sosialurin.fo

Klaksvík:
Mitt meðan Føroyar og Frakland spældu dyst á Tórsvølli, komu grindaboð til Klaksvíkar.

Illa gekst, at fáa nakran eftir henni, áðrenn skotski dómarin hevði bríksla̱ð dystin av. Men tá so dysturin var lokin, sást ein heilur herur av bátum fara út eftir vánni.

Grindin varð funnin út fyri Húsar á Kalsoynni, men hetta var sum sagt mitt undir dystinum. Tá hálvur tími var eftir av dystinum, var grindin út fyri Syðradali, og tá bátarnir komu eftir dystarlok, mest sum møttu teir grindini á pollinum.

Karl Johansen, varasýslumaður, sigur, at drápið gekk longi, men væl.

Dúgvan varð nakað seinkað av rakstrinum eisini.

40 bátar vóru við í drápinum, og tá liðugt var, høvdu 291 springarar lagt beinini. Hesi vórðu býtt millum tey, ið luttóku í drápinum og so sjúkrahúsið, vistarheimið, sambýlið og líknandi.

Seðlarnir komu út klokkan trý hósmorgunin, og klokkan sjey var alt tikið upp.

Drápið tók langa tíð, men tað gekk kortini væl, sigur varasýslumaðurin í Klaksvík, Karl Johansen
Mynd: Norðlýsið

Steinbjørn stillar uppaftur

Sitandi borgarstjórin í Klaksvík, Steinbjørn Jacobsen, hevur gjørt av, at hann stillar upp aftur til býráðsvalið í november

BÝRÁÐSVAL
Solby A. Eliasen
solby@sosialurin.fo

Sitandi borgarstjórin í Klaksvík, Steinbjørn Jacobsen, verður aftur at síggja á uppstillingarlistanum hjá Tjóðveldisflokkinum til býráðsvalið í heyst

Klaksvík:
– Eg havi hug at royna eina setu aftur, so eg havi gjørt av at stilla uppaftur, sigur Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri.

Mangan hevur verðið ført fram, at tað ger mun, tá tað er sum sitandi borgarstjóri ein stillar upp. Hetta viðgongur Steinbjørn eisini kann spæla ein leiklut, men hann dugir kortini ikki at ímynda sær, at tað er tann stóri munurin.

– Til seinasta val fekk eg gott 230 atkvøður, í mun til 77 frammaundan, so handan framgongdin verður torfør at endurtaka, sigur hann.

Jógvan við Keldu hevur boðað frá, at hann ikki stillar uppaftur, so har verða 315 atkvøður leysar, um ein kann siga tað so. Men tað heldur Steinbjørn tó ikki. Hann sigur, at hann hevur ta fatanina, at tær atkvøðurnar eru rættiliga flokstrúgvar.

– Eg haldi sum heild ikki, at klaksvíkingar velja so politiskt til býráðsval sum til løgtingsval. Og tað er eisini tað rætta, men av tí sama er tað torført at fáa staðfest júst, hvar ein flýtur, heldur borgarstjórin fyri.

Steinbjørn dylir tó ikki fyri, at hann meira enn fegin í hevði tikið eina setu afturat.

– Tað er í síðsta enda upp til veljaran, men hetta hevur verið ein ótrúliga spennandi tíð, og eg havi trivist sera væl, sigur Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík.

Óðalstíðindi aftur á gøtuni



Óðalstíðindi eru aftur at fáa í teimum vanligu sølustøðunum. Kostnaðurin er 40 krónur

Nú eru Óðalstíðindi aftur at fáa í teimum vanligu sølustøðunum

TÍÐINDASKRIV
Føroya Óðalsfelag

Óðalstíðindi verða útgivin av Føroya Óðalsfelag, ið er áhugafelagið fyri tey, ið eiga ella ynskja at eiga jørð, og øll tey, sum fáast við tað, sum jørðin hevur at bjóða. Í nýggjasta útgávuni av Óðalstíðindunum er sum altíð mangt ymiskt forvitnisligt at finna. Sum nakað nýtt, so hevur blaðið eitt høvuðsevni hesuferð, og er tað um haruveiðu og ymiskt, sum tí hoyrir til.

Í blaðnum greiðir Dorethe Block frá liviháttinum hjá haruni í Føroyum og hennara upprúna. Kári á Rógvi ummælir bókina hjá Lassa S. »Færøernes hvide hare«, harugentur greiða frá um, hvussu haruskinn kunnu gagnnýtast við garving og samrøða er við Svend Krosstein um haruveiðuútgerð og hugleiðingar um trygdina.

Umframt høvuðsevnið, so eru aðrar greinar, millum annað ein samrøða við Karsten Hansen, løgtingslim, um seyðahald í Mikladali, har hann millum annað sigur sína hugsan um, hvussu umráðandi tað er, at rættindini til smábrúk ikki verður settur til síðis av tvørligum umsitingarligum ásetingum, og at tann einstaki sleppur at ráða yvir egnum brúki, tá ið umræður brúk til egna nýtslu.

Áhugaverd grein er um uppskot, til eina endaliga loysn fyri at halda seyðin burtur av landsvegnum og harvið minkað um ferðsluvanlukkur, ið standast av seyði niður í mest sum einki. Greinin í eina samrøðu við Ferðslutrygd.

Óðalstíðindi er blað fyri øll, ið hava áhuga fyri tí, sum tann vakra og av Harranum gávuríka náttúra í Føroyum kann bjóða øllum føroyingum at gagnnýta, um farið verður fram við skili.

Óðalstíðindi kosta 40 krónur í leysasølu og kann keypast á teimum vanligu sølustøðunum, men limir felagsins fáa limablaðið ókeypis. Ein og hvør kann gerast limur.